UTTAN ÚR HEIMI

Vita ikki dagin

Russar avsannaðu í gjár tíðindi úr Moskva um, at russiska herleiðslan hevði fingið fatur á upplýsingum, sum bendu á, at amerikanarar ætla sær at leypa á Irak síðst í næsta mánað.

Tað var tíðindastovan Interfax, sum bar tíðindini frá keldum í herleiðsluni, men í gjár avsannaði Sergej Ivanov, verjumálaráðharri, at nakað hald er í tíðindunum. Hann legði afturat, at sær kunnugt hava amerikanarar framvegis ikki sett nakran dag fyri, nær eitt møguligt álop á Irak skal setast í verk.

Sambært Interfax hava amerikanarar gjørt av at fara undir álopið, so skjótt teir og teirra sameindu hava savnað 150.000 hermenn við Persaflógvan, og sambært kelduni hjá tíðindastovuni verður tað einaferð síðst í februar.

Byggir 29 skip

Sleipibátafelagið hjá A.P. Møller, Switzer, hevur bílagt 29 nýbygningar, sum verða hildnir at kosta umleið eina milliard krónur.

Seks av skipunum skulu byggjast á donsku Lindø-skipasmiðjuni, sum A.P. Møller eigur, men tað er møguligt, at skipasmiðjan skal byggja átta skip afturat. Skrokkarnir verða kortini ikki bygdir har, men á einari skipasmiðju í Litava.

Lindø skal lata reiðarínum tann fyrsta nýbygningin næsta ár, og ætlandi verða øll 29 skipini liðug í 2006. Tey skipini, sum ikki verða bygd í Danmark, skulu byggjast á skipasmiðjum í Australia, Spania og Singapore.

Tikin fyri skattasvik

Forkvinnan í svenska Vinstraflokkinum, Gudrun Schyman, er tikin fyri at hava snýtt í skatti. Sambært skattavaldinum hevur hon sett útreiðslur í sjálvuppgávuna, sjálvt um flokkurin ella Ríkisdagurin høvdu goldið pengarnar.

Skattavaldið heldur brotið vera sera álvarsamt, og Gudrun Svhyman hevur fingið at vita, at hon skal rinda 90.000 krónur afturat í skatti. Av hesum eru 28.000 krónur bót fyri svikið.

Sjálv sigur floksforkvinnan, at hon hevði so nógv at gera, tá sjálvuppgávan fyri 2001 skuldi gerast, at hon kom til at gera okkurt mistak. Hon sigur seg vera fegna um, at mistakið nú er rættað og heldur, at málið er eitt tekin um, at svenska skattavaldið virkar væl. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Gudrun Schyman er frammi í fjølmiðlunum. Fyrr hevur hon fingið umrøðu orsakað av rúsdrekkatrupulleikum.

Fekk elrokning uppá 7,6 mió.

Nú nógv skrivstovuarbeiði verður gjørt við teldum og uttan, at nakað mannaeyga hyggur at, hendir tað stundum, at fólk fáa boð um ymiskt, sum er heilt burturvið.

Soleiðis var í hvussu er, tá norska elfelagið Dalane Energi herfyri sendi einum húski í Vikeså í Rogalandi rokning fyri elnýtslu. Tá konan í húsinum breyt rokningina upp, gjørdist hon bæði ørkymlað og frá sær sjálvum, tí har stóð, at tey skuldu rinda 7,6 milliónir krónur fyri elnýtslu. Í Dalane Energi vóru tey skjót at biðja um mumbering, og talið varð rættað.

Tað vísti seg, at teldan hjá elfelagnum var komin til ta niðurstøðu, at húskið í Vikeså hevði nýtt góðar 9,9 milliónir kilowatttímar teir báðar mánaðarnar, tey høvdu átt húsini. Sambært telduni var streymmátarin farin eina ferð runt í hesum tíðarskeiðinum og var byrjaður um á annað umfar.

Nyrup NATO-aðalskrivari?

Kappingin um, hvør skal taka við sum aðalskrivari í NATO eftir skotan George Robertson, er farin í gongd.

NATO
Árni Joensen:

George Robertson gevst sum NATO-aðalskrivari í desember, og eftirmaðurin kann fara at eita Poul Nyrup Rasmussen.

Aðalskrivarin í NATO, George Robertson, hevur nú boðað frá, at hann ætlar at leggja frá sær í desember í ár, og kappingin um, hvør skal taka við, fór í gongd alt fyri eitt.

Fyri tveimum mánaðum síðani segði danski forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, at eftir hansara tykki er undanmaður hansara, Poul Nyrup Rasmussen, væl egnaður til eitt altjóða leiðarastarv. Í forsætismálaráðnum í Keypmannahavn verður váttað, at her er hugsanin framvegis tann sama. Politiskir eygleiðarar í Danmark hava leingi sagt, at stjórnin mundi fara at taka fyrverandi forsætisráðharran fram, varð okkurt av teimum týðandi altjóða størvunum leyst.

Tað kom óvart á fleiri, tá George Robertson boðaði frá avgerð síni, men kortini liggja fleiri longu framvið. Umframt Poul Nyrup Rasmussen tosa norðmenn um teirra verjumálaráðharra, Kristin Krohn Devold, og norski uttanríkisráðharrin, Jan Petersen, hevur eisini verið nevndur sum møguligt evni.

Tað ljóðaði í gjár, at polski forsetin, Aleksander Kwasinevski, var hugaður at stilla upp, men tað avsannaði hann seinni.

Tann 56 ára gamli George Robertson hevur verið NATO-aðalskrivari síðani 1999. Frammanundan var hann verjumálaráðharri í stjórnini hjá Tony Blair.

Uttanríkisráðharrin fyri atfinningum

Fremstu donsku løgfrøðingarnir finnast at Per Stig Møller, uttanríkisráðharra, tí hann hevur sagt, at fangarnir í Guantanamo kunnu verða verandi har í eini 20 ella 30 ár.

DANMARK
Árni Joensen:

Tað var í einari samrøðu við fjølmiðlar, at Per Stig Møller segði, at fangarnir, sum amerikanararnir hava sitandi á herstøðini Guantanamo á Kuba, kunnu verða sitandi har í eini 20 ella 30 ár afturat.

Orð hansara hava elvt til atfinningar, tí ein av fangunum á herstøðini er danskur ríkisborgari.

Tveir teir fremstu løgfrøðingarnir í Danmark, Eva Schmidt og Ole Espersen, siga, at Danmark kann og eigur ikki at góðtaka, at ein danskur ríkisborgari verður hildin fangi so leingi. Tey bæði vísa á, at eingin av fangunum hevur verið fyri einum dómara, hóast teir hava sitið innistongdir í meiri enn eitt ár.

Eva Schmidt sigur, at eru fangarnir tiknir sum brotsmenn, eiga teir at koma fyri rættin, og eru teir krígsfangar, eiga teir sambært Genev-e-sáttmálanum at verða sendir heim, tá kríggið, sum teir vórðu tiknir í, er av. Fangarnir vórðu tiknir í Afghanistan, og tað kríggið endaði í fjør, tá tillagingarstjórnin í Kabul tók við valdinum, siga donsku løgfrøðingarnir.

Leggja italskar fiskakeyparar undir at stjala fisk

Fiskur úr Noregi hvørvur javnan á veg til keypararnar í Italia. Nú halda norðmenn, at tað eru fiskakeypararnir sjálvir, sum stjala fiskin.

FISKASØLA
Árni Joensen:

Trupulleikin við fiskinum, sum hvørvur á veg til keypararnar, hevur leingi verið stórur, og fyri einum mánað síðani viðgjørdi felagið hjá norsku lastbilaeigarunum málið.

Á fundinum komu eitt uppskot um at skipa søluna soleiðis, at keypararnir hava ábyrgdina av fiskinum, so skjótt hann er komin inn um italska markið. Orsøkin til hetta eru gitingar um, at tað eru italskir fiskakeyparar, sum stjala fiskin, og at myndugleikarnir í fleiri førum hjálpa teimum. Millum annað er komið fram, at í einum føri varð ein lastbilførari tvungin at ferma bilin aftur, eftir at hann hevði avskipað farmin í einari móttøkuhøll. Tá hann hevði fingið fiskin upp í lastina aftur, rak løgreglan hann burtur, so onkur kundu stjala fiskin.

Fiskastuldurin í Italia hevur kostað norsku tryggingarfeløgunum nógv, og tey taka undir við, at keypararnir skulu hava ábyrgdina av fiskinum. Hinvegin hevur norska fiskivinnan ikki víst sama vilja at loysa málið, skrivar norska tíðindastovan NTB.

Orðið verður frítt, tá Annlis Bjarkhamar næstu dagarnar fer at lurta eftir lærarunum kring landið. Hon heldur, at vit heldur eiga at kjakast um, hvussu vit kunnu brúka verandi játtan, enn at biðja um hægri játtanir

Annlis súsar kring alt landið

- Vit skulu spyrja hví, vit hava tær skipanir, vit hava, sigur Annlis Bjarkhamar, sum í næstum ætlar sær at lurta eftir skúlastýrislimum, skúlastjórum og lærarum kring alt landið. Men hon útilokar tó ikki, at hon í næstum eisini fer at lurta teimum, sum fylla mest í fólkaskúlanum, nevniliga næmingunum

FÓLKASKÚLIN
Theodor E. D. Olsen

Ein ráðharri skal ikki bara seta lógir og kunngerðir í gildi og taka avgerðir fyri fólkið. Ein ráðharri skal eisini lurta eftir fólkinum.

Hetta aðaðlmiðið hevur landsstýriskvinnan við mentamálum, Annlis Bjarkhamar, sett sær.

Sum Sosialurin skrivaði í gjár, ætlar hon sær nevniliga í næstu viku at byrja eina ferð kring alt landið, har hon skal hitta skúlastýrislimir, skúlastjórar og lærarar.

Fundirnir skula fara fram á tann hátt, at skúlastjórarnir og skúlastýrisformenninir skulu byrja við hvør sínari røðu. Síðani sigur tann sjálvboðni gesturin, landsstýriskvinnan Annlis Bjarkhamar, nøkur orð, og eftir hetta verður orðið frítt hjá lærarunum og skúlafólki annars, tí ætlanin er at lurta eftir meiningunum hjá lærarunum og teimum, sum starvast í skúlanum.

Við hesum væntar Annlis Bjarkhamar at skapa tryggleika við teimum langtíðarætlanum, ið koma burturúr.

Føgur orð og konkretur veruleiki

Annlis Bjarkhmar greiðir frá, at upprunin til hesa ætlan um at gera eina ferð kring oyggjarnar, er tann, at Føroyar yvirtóku fólkaskúlan 1. januar 2001. Hetta staðfesti táverandi landsstýrismaður, Óli Holm, við slagorðunum "Tann góði fólkaskúlin", og nú ætlar Annlis Bjarkhamar at gera hesi føgru orðini til konkretan veruleika.

Av tí at landsstýriskvinnan kom inn í árið hjá "Tí góða fólkaskúlanum", sigur Annlis Bjarkhamar, at tað ikki var so lætt í fyrstuni at koma inn í hetta arbeiðið. Hon skuldi jú fara í holt við eina ætlan, sum var eitt hugskot hjá undanfarna landsstýrismanni.

Eisini sigur landsstýriskvinnan, at hon í síni tíð sum lærarasúlanæmingur ofta saknaði politiskt initiativ á skúlaøkinum. Hon heldur, at føroyingar innan fólkaskúlan heldur eiga at spyrja, hvussu vit ætla at arbeiða eftir núverandi játtan en enn at biðja um eykajáttan til fólkaskúlan, og tí fer Annlis Bjarkhamar teir næstu dagarnar at ferðast kring landið, har hon ætlar at byggja brýr millum tað politiska og tað umsitingarliga, sum hon tekur til.

Skúlin súsar

Í sambandi við rundferðina hjá mentamálaráðharranum, hevur Mentamálaráðið eisini tikið stig til eitt rit, har 14 fólk úr føroyskum vinnulívi, politikki og skúlaumhvørvi hava skrivað sínar tankar um fólkaskúlan og undirvísing sum heild. Brot úr hesum riti stóðu í Sosialinum í gjár.

Ritið, ið kallast Sús – Skoðanir úr skúlanum – er eitt slag kjakskapara undan túrinum hjá Annlis Bjarkhamar, og hon leggur dent á, hon einki hevði álagt teimum fjúrtan fólkunum at skriva um, og tí fegnast hon um tað fjølfáttaða úrslitið, sum er komið burturúr.

Ritið verður í hesum døgum sent teimum, ið fundirnir kring landið eru ætlaðir.

Fólkaskúlin er fyri næmingarnar

Spurd, um hon bert ætlar sær at práta við stýrislimir, stjórar og lærarar á ferðini og ikki næmingarnar, svarar Annlis Bjarkhamar í fyrstu syftu, at hatta er ein góður spurningur. Men hon leggur síðani dent á, at onkustaðni er ein noyddur at byrja, hóast tað kann vera trupult, men ætlanin er ikki at leypa næmingarnar um, tí virkisætlanin hjá Annlis Bjrkhamar fer ikki í gongd enn, so kanska kundi várið verið brúkt til at hitt næmingar, heldur landsstýriskvinnan. Tí sum hon sigur, so er tað ov sjáldan, at næmingarnir verða spurdir, og skúlin er ikki til fyri lærararnar, men fyri næmingarnar.

Ikki hvussu men hví

Annlis Bjarkhamar arbeiðis nevniliga við eini virkisætlan, sum hon ætlar byrja 1. apríl í ár, og andin í hesi virkisætlan er, at um skúlin er til fyri næmingarnar, so er hetta ein ringrás, har skúlin er fyri allar partar, tí hetta skal vera gott fyri allar partar, sigur Annlis Bjarkhamar.

Spurd, um ein slíkur túrur kring landið ikki er at blanda seg upp í sína fyrisiting og leggja seg út í smálutir, sigur Annlis Bjarkhamar, at tað kann ein siga, men onkustaðni skal ein byrja, og hon leggur enn einaferð dent á, at í føroyska fólkaskúlanum verður oftari spurt um hægri játtan, heldur enn at spyrja, hvussu vit skulu umsita og brúka verandi játtan. – Vit spyrja altíð, hvussu vit skulu arbeiða undir núverandi skipanum, heldur enn at spyrja, hví vit hava núverandi skipanir, sigur Annlis Bjarkhamar, sum leggur afturat, at virkisætlanin hjá henni er ein staðfesting av politiska viljanum, sum nú sambært henni sjálvari byrjar úti í skúlunum.

Rundferðin hjá Annlis Bjarkhamar byrjar í Trongisvági mánadagin 27. januar og endar á Giljanesi 12. februar.